betri pensjón

# Marknaðarkunning fyri 4. ársfjórðing 2025

2025 bleiv eitt ár, har marknaðirnir, hóast nógv handils- og geopolitiskt rok, endaðu við einum jaligum avkasti. Harumframt hevur vitlíki aftur verið í miðdeplinum í 2025, og tjóðbankarnir settu leiðandi rentuna niður fleiri ferðir í árinum.

## Partabrøv

Aftaná "Liberation Day" í apríl, har Trump vendi øllum á høvdið við sínum nýggja handilspolitikki, væntaði marknaðurin, at hetta fór at skapa eina djúpa, altjóða búskaparkreppu. Tíbetur bleiv gongdin ikki so, og sum árið leið, minkaðu fráboðaðu tollhækkingarnar, og altjóða búskapurin vísti seg sum heild at vera stinnur og mótstøðuførur.

Tær sonevndu "Magnificent 7" – stóru amerikonsku tøknifyritøkurnar – hava aftur í 2025 gingið á odda í góðu gongdini, serliga NVIDIA og Google. Harumframt hava hesar fyritøkurnar gjørt risastórar íløgur fyri at stimbra framhaldandi vøkstur innan AI næstu árini. Tað hevur verið nógv kjak um eina møguliga AI-bløðru. Tað eru m.a. hesar ógvuliga stóru íløgurnar innan vitlíki, sum hava elvt til stúran, og tað, at hesar fyritøkur gerast ein størri og størri partur av marknaðinum. Tó er bløðran torfør at fáa eyga á í løtuni, av tí at flestu av hesum fyritøkum forvinna sera nógv pengar.

Amerikanski dollarin fall umleið 12% í mun til evruna í 2025. Orsøkirnar eru serliga handilspolitiskar óvissur og hægri tollavgjøld, ið hava minkað álitið á dollaranum. Harafturat setti amerikanski tjóðbankin leiðandi rentuna niður og signaleraði enn fleiri rentulækkingar komandi ár.

Vísitalið fyri partabrøv "MSCI World" vísti eitt avkast á 21% (USD) og 7% (EUR) fyri 2025.




*Kelda: msci.com (net return)*

## Lánsbrøv

Amerikanski tjóðbankin, FED, lækkaði aftur rentuna í desembur, og var hetta triðja rentulækkingin í 2025. Evropeiski tjóðbankin, ECB, gjørdi onga rentulækking á rentufundinum í desembur. ECB lækkaði annars rentuna fýra ferðir í 2025. Leiðandi renturnar hjá FED og ECB eru nú ávikavist 3,75% og 2,00%.

Arbeiðsmarknaðurin í USA hevur víst veikleikatekin í seinnu hálvu í 2025. Starvsfólkavøksturin tykist nærum steðgaður upp, meðan arbeiðsloysið er vaksið eitt sindur síðan á vári 2025. Harafturat er inflatiónin hækkað í USA. Hóast hetta var búskaparligi vøksturin í USA góður, og væntast hann at enda beint omanfyri 3% fyri árið. Á hesum økinum halta Evrulondini langt aftanfyri USA, og væntast har ein vøkstur á einans 0,9% í 2025. Inflatiónin tykist hinvegin verða komin niður á málið á 2%. Grundarlagið er harvið gott fyri fleiri rentulækkingum hjá ECB, um vøksturin heldur fram at verða lítil.




*Kelda: tradingeconomics.com*

## Útlit

Árið 2026 byrjaði hendingaríkt – í minni mun orsakað av búskaparligum viðurskiftum, men heldur grundað á geopolitisku støðuna millum USA og Venesuela. Ávirkanin á virðisbrævamarknaðin er tó avmarkað higartil.

Nógv bendir á, at búskaparligi vøksturin í heiminum heldur áfram, eisini hóast arbeiðsmarknaðurin í USA haltar eitt sindur. Búskapurin verður í 2026 stimbraður bæði av fíggjar- og pengapolitikki í USA, harundir skattalættum og lægri leiðandi rentum. Í Evropa verður

nógv hugt at Týsklandi, ið hevur slept skuldarbremsuni, tí hetta kann seta gongd á virksemi í Evropa.

Tvær rentulækkingar koma væntandi í USA í 2026, men eingin fyri Evrulondini. Frá evropeiskari síðu hevur ECB meldað út, at tað verða tey leypandi búskaparligu lyklatølini – serliga gongdin í inflatiónini – ið fara at avgera, um fleiri rentulækkingar kunnu koma í 2026.

Gongdina á gjaldoyramarknaðinum er altíð ein jokari, sum ávirkar avkastið. Sveiggini kunnu verða stór frá ári til árs – tað var 2025 eitt gott dømi um. Tó er umráðandi at hava í huga, at hesi sveiggj javna seg yvir tíð. Væntað verður nú, at amerikanski dollarin fer at styrkjast í mun til evruna í 2026. Hinvegin eru fleiri váðafaktorar, ið kunnu elva til eina framhaldandi versnan av dollaranum. Serliga hvønn Trump útnevnir sum nýggjan tjóðbankastjóra, og í hvønn mun hann kann fáa ávirkan á rentustøðuna.

Samanumtikið eru væntanirnar jaligar fyri einum góðum parta- og lánsbrævaári í 2026.

## Virðisbrævagoymslan hjá Betri Pensjón

Í 2025 er virðið á partabrøvunum í goymsluni hjá Betri Pensjón samanlagt hækkað við 3,94%. Hyggja vit at oktobur, novembur og desembur hvør sær, góvu hesir mánaðirnir ávikavist 2,52%, -0,60% og 0,75% í avkasti.




Lánsbrævaparturin í goymsluni er samanlagt hækkaður við 3,88% í 2025. Oktobur, novembur og desembur góvu ávikavist 0,77%, 0,14% og 0,18%.




Størsti parturin av partabrævagoymsluni er støðlaður í altjóða partabrøvum, og ein minni partur er í donskum partabrøvum. Størsti parturin av lánsbrøvunum hjá Betri Pensjón er støðlað í donskum stats- og realkredittlánsbrøvum, meðan ein minni partur er støðlaður í virkislánsbrøvum og útlánum til føroyskar fyritøkur.

## Fyrivarni

Endamálið við hesi marknaðarkunning er einans at geva eina frágreiðing um, hvussu gongst við virðisbrøvunum hjá Betri Pensjón og at kunna um hendingar, ið kunnu ávirka gongdina. Hóast frágreiðingin er gjørd við stórum nærlagni, skal henda ikki skiljast sum tilmæli frá Betri Pensjón – hvørki til at keypa, selja ella taka aðrar avgerðir út frá.

